Eingin millumbylgjusendari

Restina av hesari vikuni fer ikki at bera til at hoyra føroyingin á millumbylgjuni.

Eitt brek á sendaran suðuri á Akrabyrgi hevur fyribils syrgt fyri, at sendarin ikki verður brúktur – og tað verður hann helst ikki meira restina av hesi vikuni.

Sum skilist er onkur sýra likin, so eldur er komin í, og hevur hesin eldurin gjørt so mikið av skaða, at sendarin ikki er tøkur.

Tí mugu fólk altso smyrja seg við, at tey bert kunnu hoyra útvarpið á FM.

hj.

Alt um AIDS-bøkur, ið eru til láns

Føroya Landsbókasavn og Býarbókasavnið í Havn eru í felag komin út við einum lítlum bókalista, ið umfatar alt tað, fáast kann til láns um AIDS á báðum bókasøvnunum.

Tilsamans eru 52 heiti í bókalistanum, og er talan fyri tað mesta um yrkisbókmentir, men eisini nakrar skaldsøgur.

Gjørt verður í faldaranum vart við, at bøkur, sum eru komnar út áðrenn umleið 1988, kunnu innihalda upplýsingar, ið ikki eru eftirfarandi longur. Tað er sjálvandi eitt sindur óheppið, tí tveir triðingar av teimum bókunum, ið eru til taks á bókasøvnunum um AIDS, eru frá 1988 ella eldri.

hj.

Pinku-úrslitini vórðu gloymd

Í Grand Prix-reportasjuni í gjár gloymdu vit tíverri úrsliini hjá pinkunum, men tey hava vit so her:

Ljósið vann við 37,0 stigum, meðan Flog fekk 33,0 stig. Umberið okkum.

hj.



Mynd: Kalmar

Friðarligt á føstulávint

Hóast sera nógv fólk hevði leitað sær »í býin« í fyrrakvøldið í sambandi við at tað var føstulávintsmánakvøld, visti politiið í Havn ikki at siga frá nøkrum serligum ófriði.

– Alt gekk friðarliga fyri seg, og vit tóku eitt nú ongan fyri at koyra við kenning, segði vakthavandi á Politistøðini í Havn í gjár.

Hann visti at siga, at onkunstaðni kærdu grannar um, at tað var heldur nógvur gangur, tí fólk var farið útum at slá tunnu, hevði politiið eingi álvarslig arbeiðsørindi í sambandi við tað heldur.

hj.

Føroyskir svimjarar góð úrslit

Í kappingini Malmö Open, sum var í Svøríki fyri hálvari aðru viku síðani, fingu føroysku svimjararnir stak góð úrslit – heili 9 gullmerki

Vanliga hava tríggir føroyskir svimjarar verið við í kappingini Malmö Open, men hesaferð fóru fimm avstað. Ætlanin var, at sjey svimjarar skuldu við, men vegna sjúku komu tveir teirra ikki við.

Føroyska ferðalagið hesaferð taldi svimjararnar Katrin Johansen, Durið Svenson, Tóru við Keldu, Esther Høj og Símun Petur Zachariassen. Ferðaleiðari var Marjun á Plógv og venjari Katrin Michaelsen.

Kappast varð móti tjóðum sum Svøríki, Noregi, Danmark, Íslandi, Týsklandi, Pólandi, Hollandi og Tjekkoslovakia, so hetta var ein stór kapping.

Úrslitini sum heild vóru sera góð, og fingu okkara svimjarar níggju gullmerki.

Tóra við Keldu vann gull í 50, 100 og 200 m frí, Katrin Johansen vann gull í 100 og 200 m frí, 100 m rygg og 100 m bringu og Durið Svenson vann gull í 100 m frí.

Eisini hinir svimjararnir høvdu góð úrslit, og verður farið aftur til Svøríkis til várs at kappast um NM.

hj.

Óli P. teknar á Torginum

Frá seinnapartinum í morgin og restina av gerandisvikuni fer skemtiteknarin Óli Petersen av Skála at tekna skemtitekningar av nøkrum persónum, ið koma at sita sum livandi modell á Torginum í SMS, meðan Óli teknar teir. Allar tekningarnar verða selda leygardagin, og peningurin fer til húsið hjá teimum arbeiðsleysu niðri á gamla meiarínum

Seinnapartin í morgin byrjar eitt nýtt tiltak á Torginum í SMS, har skemtiteknarin Óli Petersen fer at tekna níggju persónar, ið allir fara at sita modell á staðnum.

Byrjað verður kl. 15.30, og so teknar Óli Petersen ein persón um tíman, so tað verða tríggjar tekningar um dagin mikudagin, hósdagin og fríggjadagin.

Tey, ið hann fer at gera skemtitekningar av, verða Heðin Mortensen, Marita Petersen, Tróndur Patursson, Jóhs. Berg, Kári Reynheim, Jan Kløvstad, Elis Poulsen, Hilmar Jan Hansen og Lisbeth L. Petersen.

Ætlanin er, at meðan Óli teknar, skulu fólk á sjónvarpsskiggjum á Torginum fáa fylgt við, hvat hann ger, eins og ætlanin eisini er, at bæði Óli og »ofrini« skulu hava mikrofon, so áskoðararnir kunnu fylgja við øllum,ið sagt verður.

Leygardagin kl. 13 verða so tær níggju tekningarnar seldar á uppboðssølu, og fer peningurin óskerdur til húsið hjá teimum arbeiðsleysu niðri á gamla meiarínum.

Óli Petersen er eftirhondini eisini við at gerast kendur sum teknari uttan fyri landoddarnar. Hevur fleiri ferðir verið í donskum blaðum, og fríggjadagin stóð tekningin til høgru í grønlendska blaðnum Sermitsiak.

hj.



Killissaq anguneqalerpoq. Savalimmiut annertuumik ajornartorsiorneranni Lars Emil Johansen-ip pitsaasunik siunnersuuteqarnissamik neqeroorutaa Kalaallit Nunaanniinnanngitsoq aalassatsitsisimavoq. Savalimmiuni avisip »Sosialen«-ip titartagaq una marlunngormat ilanngussaa, kalaaleq qajartortoq allunaasamik naloriussisoq · savalimmiormiutut taaneqartartoq »endin« — ikiorserumalluugu savalimmiormiut umiarsuaat ajornartorsiortoq »Skuldareyvin« (Akiligassalissuaq). Titartagaq qulequtaqarpoq »Killissaq anguneqalerpoq.

(Titartaasoq: Ole Petersen)

Enden er nær. Lars Emil Johansens tilbud om at hjælpe Færøerne med gode råd i landets voldsomme krise harikke kun vakt opsigt i Grønland. På Færøerne bragte avisen »Sosialen« i tirsdags denne tegning, hvor en grønlandsk kajakroer kaster et reb — på Færøerne kaldet »endin« — for at hjælpe det nødstedte, færøske skib »Skuldareyvin« (»Skyldnerrøven«). Tegningen har overskriften »Endin er nær«.

(Tegning: Óli Petersen)